# fyri mismun

var tí sjúkrameldað í fýra vikur. Óluva fekk sjúkraváttan frá læknanum, sum hon vísti arbeiðsgevaranum.

- Eg sá beinanvegin, at teir vóru ikki glaðir fyri boðini, hóast tey ynsktu mær tillukku og tað heila. Beint áðrenn eg fór aftur til arbeiðis í mars, ringdu teir til mín og spurdu, um eg ætlaði mær at halda fram. Eg vildi gjarna halda fram, sjálvt um eg nú var blivin uppá vegin, sigur Óluva.

Hon greiðir frá, at ein av leiðarunum á arbeiðsplássinum hevði sagt við seg undir fýra eygum, at hennara graviditetur hevði givið bakarínum trupulleikar.

- Eg vildi halda fram, tí eg trúði uppá, at tað bar til, hvis eg hevði nóg sterkan vilja, sigur Óluva úr telefonini úr Nólsoy.

### Uppsøgnin kom dátt við

Eina viku eftir at Óluva kom aftur til arbeiðis eftir drúgva sjúkralegu, fekk hon eina skrivliga uppsøgn, sum er dagfest tann 19. mars.

Grundgevingarnar hjá Grón vóru "vantandi uppmøting, tvørrandi samskifti við meistara og ov langar roykipausur." Hesar grundgevingarnar kennir Óluva tó als ikki aftur.

- Hasar grundgevingarnar hava tey funnið uppá. Eg hevði ikki hoyrt nakað hetta áðrenn, og hvis hatta var eitt problem, so hevði eg hoyrt um tað áðrenn, sigur Óluva Hansen.

Hon greiðir frá, at hon hevði hoyrt sum leysaprát, at bakaríið fór at søkja eftir nýggjum lærlingi, og tá hon so spurdi meistaran, fekk hon at vita, at tað var hennara starv, sum bleiv lýst leyst.

- Eg fekk at vita, at eg kundi fara upp á kontórið eftir uppsøgnini. Eg gjørdist sera kedd, tí hetta var eitt starv, sum eg tímdi væl og treivst væl í. Eg hevði heldur ikki væntað, at fingið hesa uppsøgnina, sigur Óluva.

Óluva fór til hús, men hon vendi sær síðani til Yrkisdepilin (fyrr Læruráðið), og har fekk hon at vita, at hon kundi venda sær til Javnstøðunevndina.

- Eg fortaldi Javnstøðunevndini hvat og hvussu og vísti teimum uppsøgnina. Tey søgdu beinanvegin, at hatta var ikki nóg góð uppsagnargrund. Tey vóru vís í, at grundin til uppsøgnina var mín graviditetur, sigur Óluva.

Hon gjørdist sjálvsagt fegin um boðini, sum hon fekk frá Javnstøðunevndini, og nú hevur løgfrøðiliga niðurstøðan hjá nevndini eisini givið Óluvu viðhald.

### Javnstøðunevndin er ókend

Javnstøðunevndin sigur í sínari niðurstøðu, at bakaríið Grón óivað ikki er tann einasti ella ringasti arbeiðsgevarin á hesum økinum. Hetta ber boð um, at hesin trupulleikin ikki er ókendur í Føroyum.

Og Óluva kennir eisini til trupulleikan frá øðrum.

- Nógvar kvinnur í Føroyum hava verið í líknandi støðu, men fleiri velja einki at gera við støðuna, sigur Óluva, sum eisini kennir til konkret dømir við kvinnum, sum verða uppsagdar orsakað av barnsburði.

Hon heldur, at ein av grundgevingunum er, at fólk ikki kenna sín rætt sambært lógini, og at fleiri als ikki vita, at Javnstøðunevndin yvirhøvur er til.

- Eg visti slet ikki, at Javnstøðunevndin var til, ella at vit hava eina javnstøðulóg, sum tryggjar mær ávís rættindi, sigur Óluva at enda.

Men Óluva Hansen letur seg tó ikki taka av fótum, tí tann 1. mars í ár skal hon byrja í læru sum bakari hjá Mylnuni í Havn. Treiska nólsoyardaman hevur eftir øllum at døma sett í seg, at hon skal vera bakari.

## ÚRSKURÐUR

**Hetta er samandrátturin av málinum, sum Javnstøðunevndin hevur kunngjørt á heimasíðuni hjá sær:**

Javnstøðunevndin hevur álagt bakarínum P/F Grón at rinda einum lærlingi góðar 140.000 kr., svarandi til 35 vikulønir, vegna uppsøgn. Uppsøgnina metti nevndin vera grundaða á viðgongu/graviditet.
Unga kvinnan byrjaði í læru hjá P/F Grón í oktober 2006. Uml. tveir mánaðir seinri varð hon við barn og boðaði arbeiðsgevaranum frá hesum í februar. Tá var 3 mánaða royndartíðin úti. Í mars varð hon uppsøgd við grundgevingunum "vantandi uppmøting, tvørrandi samskifti við meistara og ov langar roykipausur".
Lærlingurin kærdi málið til javnstøðunevndina, og nevndin metti, at uppsøgnin reelt var grundað á viðgongu/graviditet og sostatt brot á javnstøðulógina. Nevndin hevur tí álagt P/F Grón at rinda lærlinginum 35 vikulønir, svarandi til 143.500 kr.
Nevndin leggur dent á, at hesin einstaki arbeiðsgevarin neyvan er tann einasti ella ringasti, ið brotið hevur javnstøðulógina. Heldur er talan um, at bæði arbeiðsgevarar og løntakarar eru ókendir við arbeiðsmarknaðarreglurnar í lógini og tí ikki hugsa um lógina í starvsfólkamálum. Eisini var arbeiðsgevarin í truplari støðu vegna aðra lóggávu (lærlingalógina), ið gjørdi tað sera trupult hjá virkinum ikki at gera mismun.
Nevndin metir, at brot er framt á § 6 í javnstøðulógini, at Óluva Hansen vegna uppsøgnina frá P/F Grón hevur verið fyri týðandi mismuni vegna viðgongu og eigur at fáa 35 vikur í løn sum samsýning, mettar til kr. 4.100, ella kr. 143.500 tilsamans.

*Les úrskurðin í fullari longd á www.javnratt.fo.*

# Vil gjalda góðar 40.000 krónur

**Leiðslan í fastheldur, at tað ikki var orsakað av graviditet, at Óluva Hansen úr Nólsoy var uppsøgd sum lærlingur á bakarafyritøkuni. Mistak okkara var, at vit ikki góvu henni skrivliga ávaring, sigur Regin Nielsen, stjóri í p/f Grón**

ARBEIÐSTRÆTA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

»Vantandi uppmøting, tvørrandi samskifti við meistara og ov langar roykipausur«. Hetta vóru grundgevingarnar hjá leiðsluni í p/f Grón at siga nú 21 ára gomlu Óluvu Hansen úr Nólsoy upp úr hennara lærlingasáttmála við bakarafyritøkuna.

- Eg skal viðganga, at tað var eitt mistak ikki at geva henni eina skrivliga ávaring, áðrenn vit søgdu henni upp. Hetta sigur Regin Nielsen, sum er stjóri í p/f Grón.

Hann heldur fast við, at tað onki hevði við graviditet at gera, at lærlingurin varð uppsagdur. Stjórin vísir á, at tilsamans níggju fólk – fýra kvinnur og fimm menn – síðani august í 2006 hava fingið barsilsfarloyvi frá Grón.

Fyritøkan ætlar sær ikki at gjalda tær 143.000 krónurnar, sum Javstøðunevndin er komin fram til, at kvinnan skal hava í endurgjaldi. Stjórin vísir á, at sáttmálanevndin, sum allir brotnir lærlingasáttmálar skulu leggjast fyri, hevur roknað seg fram til eitt endurgjald upp á góðar 40.000 krónur.

- Hesa upphæddina ætla vit okkum at gjalda, sigur Regin Nielsen.

Spurdur um hví kvinnan ikki kundi verða verandi í læru hjá Grón, sigur stjórin, at hann fekk at vita frá arbeiðsleiðaranum, at hon var ógnað í starvinum.

- Um vit ikki søgdu henni upp, høvdu vit mist onnur fólk, ið vit ikki kunnu vera fyriuttan, sigur stjórin á p/f Grón.

- Vit vildu skána hana fyri detaljur, tí hon skal eisini hava eina framtíð á arbeiðsmarknaðinum, sigur Regin Nielsen.

Hann heldur tað vera vánaligt av fjølmiðlunum, at Grón ikki beinanvegin í gjár, tá Javnstøðunevndin kom við sínari niðurstøðu, slapp at gera viðmerking til málið.

- Í eini slíkari sak eru altíð tvær síður, og tí átti eg at sleppa at svara beinanvegin. Eg vil bara undirstrika enn einaferð, at uppsøgnin einki hevði við gravidetet at gera, sigur Regin Nielsen.



*Stjórin í Grón, Regin Nielsen, var gestur á Rás 2 á middegi, har hann kom við síni grundgeving fyri, hví fyritøkan breyt lærlingasáttmálan og sendi nú 21 ára gomlu Óluva Hansen til hús*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Birgir Kruse ritstjóri á Føroya Skúlabokagrunni og Jens Redmer stjóri í Google Book Search*

*Mynd: Niels Petersen*

## Føroyskar bøkur á Google

Nú verða eisini føroyskar bøkur at finna í nógv umrødda bókasøluátakinum hjá Google, har fólk hava høvi at lesa ein part av bókunum á netinum

Føroya Skúlabókagrunnur hevur í dag sent ikki færri enn 904 ymsar føroyskar skúlabøkur til Kalifornia, har Google Book Search fer at skanna tær inn, so tær kunnu síggjast í einum lesieggjandi søluátaki á netinum.

Til ber at lesa minst 20% av hvørjari bók. Øll leitorðini verða tó virkin, tá leitað verður á Google. Knýtt at øllum bókunum er leinkja til Bókamiðsøluna, ið selur bøkurnar. Harafturat er møguleiki at síggja um eitt bókasavn í nánd, har tú býrt, hevur viðkomandi bók í útláni ella á lesistovu.